Havnar Kirkja:

# Ragnar og Katrina luttaka í aftankvirruni

Fríggjakvøldið 2. mars frá kl. 21 – 23 verður aftankvirra í Havnar Kirkju. Kl. 22 syngur Katrina Petersen og Ragnar Olsen spælir gittar, og kl. 22.30 verður andakt við Marjun Lómaklett, presti.

Ragnar Olsen og Katrina Petersen undirvísa bæði á Tórshavnar Musikkskúla.

Ragnar fer at spæla verk eftir Sor, Llobet og Tarrega, meðan Katrina kemur at syngja svenskar andaligar sangir og bulgarskar fólkasangir. Tey fara eisini at framføra nøkur verk saman.

Ragnar er 34 ára gamal og skopuningur. Hann er útbúgvin klassiskur gittarspælari og gittarlærari við diplom-yvirbygningi. Hann lærdi á konservatoriinum í Esbjerg og hevur eisini arbeitt sum gittarpedagogur í Esbjerg. Síðan 2005 hevur hann undirvíst á Musikkskúlanum í Havn.

Katrina Petersen er 33 ár og hálvføroysk, men hon hevur altíð búð í Keypmannahavn. Mamman er ættað úr Bø. Katrina er útbúgvin rútmiskur sangari og sanglærari við diplom-yvirbygningi. Hon lærdi á rytmiska musikkonservatoriinum í Keypmannahavn. Hon hevur verið fastur sangari til aftankvirrur í Helligåndskirken á Stroynum í Keypmannahavn. Síðan september í fjør hevur hon undirvíst á Musikkskúlanum í Havn.



*Ragnar Olsen og Katrina Petersen luttaka við gittarspæli og sangi á aftankvirruni fríggjakvøldið*

*Mynd: Magnus Gunnarsson*

Fyri 25 árum síðan:

# Sigurfari bjargaði 5 monnum



*Myndin er av Sigurðfarinum á vágni í Klaksvík beint eftir heimkomu av langutúrinum í 1982*

Tann 16. februar vóru 25 ár liðin síðan Sigurfari í ódnarveðri á Flemish Cap bjargaði fimm monnum av M/S Mekhanik Tarasov.

Í einum telduposti frá stýrimanninum Vyacheslav Kozhukhov, stílað til skiparan á Sigurfarinum, Mikkjal Olsen, verður víst stórt takksemi yvirfyri manningini á Sigurfarinum, nú 25 ár eru liðin síðan lagnutungu náttina.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Tine Hammer**, kona Rúna Hammer, andaðist mándagin 26. februar á Århuus Kommune hospital 28 ára gomul. Jarðarferðin verður leygardagin 3. mars kl. 13.30 frá Sankt Johannes kirke, Johannes Allé 1, 8000 Århuus C.

Kistan við **Kristoffur Svabo Joensen, Argir**, fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin 2. mars klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Argja kirkju leygardagin 3. mars kl. 13. Tey ið vilja minnast Kristoffur kunnu lata Argja kirkju eina peningagávu konta í peningastovnunum.

**Ivan Hjelm** fer til gravar úr Vágs kirkju fríggjadagin klokkan 13.

**Beata í Dali**, fødd Mørkøre, búsitandi í Havn andaðist á Landssjúkrahusinum 28. februar 86 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinri.

**Tórbjørn Thorsen úr Vági** andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin 28. februar 64 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum leygardagin klokkan 17 í Bethel. Jarðarferðin verður úr Bethel sunnudagin kl. 13. Tey ið vilja minnas Tórbjørn kunnu lata eina peningagávu til Føroya Felag móti Krabbameini, konta í Føroya Banka.

**Alma Maria Poulsen, Øravík, fødd Rasmussen** úr Miðvági, andaðist á Landssjúkrahúsinum 27. februar 88 ára gomul. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin 2. mars klokkan 11 til Smyril. Jarðarferðin verður úr Bønhúsinum í Øravík leygardagin kl. 13.

**Anna Blicher Winther**, Keypmannahavn - fyrr búsitandi á Sandi andaðist 26. februar 76 ára gomul. Jarðarferðin verður leygardagin 3 mars klokkan 13 (donsk tíð) úr Absalons Kirke. Sønder Boulevard 73. København V.

Árni Hjalgrím Elttør, Klaksvík, vanliga nevndur Gimmi, andaðist á Klaksvíkar sjúkrahúsi Týsdagin 27 februar 73 ára gamal. Bønarhald verður á kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi hósdagin klokkan 18.
Jarðarferðin verður úr Betesda fríggjadagin klokkan 13:30. Tey, sum vilja minnast Árna Hjalgrím kunnu lata eina peningagávu, konta í Norðoya Sparikassa.


†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum, at góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Alma Maria Poulsen**
Øravík, (f. Rasmussen úr Miðvági)

andaðist á Landssjúkrahúsinum týskvøldið 27. februar, 88 ára gomul.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin 2. mars kl. 11.00.
Jarðarferðin verður úr Bønhúsinum í Øravík leygardagin 3. mars kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Anna Elisa, Pauli, Doris, Kirstin, Jórun, Finngerð, Eyðfinn, Gunvør og Malan**

*Tey, ið vilja minnast Almu við blómum, kunnu í staðin senda eina peningagávu til Bønhúsið í Øravík, konta í peningastovnunum.*